NÁM

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Postbox 3279,
Tinghúsvegur 7
110 Tórshavn

Dagfesting:
26. oktober 2023
Tygara ref.:

Máltal: 23/21137-1

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um Kervið+

Til §1
Í viðmerkingunum til *stk. 1* standa dømi um hvørjir avvarðandi myndugleikar kunnu verða. Her eru hvørki Nám ella Prógvstovan nevnd. Hóast setningurin endar við "v.m." eigur Nám ella Prógvstovan at verða nevnd, tí í viðmerkingunum til stk. 2 í somu grein verður víst til, at tey nevndu í viðmerkingunum til stk. 1 eru "brúkarnir í høvuðsheitum". Prógvstovan er týdningarmikil brúkari, tá talan er um skipan av prógvtøkum, PISA royndum v.m. umframt viðgerð av samlaðum prógvtøku- og royndarúrslitum fyri alt landið.

Til §2
"flytast millum **skúlar**" er tað nøktandi orðing? Kann tað nakrantíð verða talan um at flyta persónsupplýsingar millum t.d. stovnar?
Stk. 3 kærufreistin á eina vika virkar stutt. Í viðmerkingunum stendur orsøkin at vera*: Fyri at barnið ikki skal líða undir, at ein móttakandi skúli ikki kann fáa upplýsingarnar fyrr enn ein evt. kærufreist er farin, er kærufreistin ásett soleiðis, at móttakandi skúlin kann fáa neyðugar upplýsingar skjótast gjørligt.*
Men ongin áseting er um viðgerðartíð av kæruni. Samstundis stendur longur frammi, at: *Viðvíkjandi kæru er útgangsstøði, at ein kæra ikki hevur steðgandi virkna.*
Vil tað siga, at upplýsingarnir verða latnir víðari, samstundis, sum landsstýrismaðurin kann brúka drúgva tíð at viðgera kæruna? Hvat er endamálið tá við hesum kærumøguleika?

Til §3
Í *stk 1 og stk. 2* stendur orðingin "egin endamál". Hvat er tað?
Haldi ikki frágreiðingin í viðmerkingunum er nóg greið.

Til §4
Undirvísingarstýrið kann nýta persónupplýsingar úr Kervi+ til umsiting av Kervi+, umsiting av skúlunum, til eftirlit, v.m.
Kunnu onnur dømi hugsast inn her? Ella er tað orðið **eftirlit,** sum hevur størst týdning?

Annars stendur í fleiri førum, at landsstýrisfólkið **kann** gera nærri reglur (§1 stk. 2, §3 stk. 3, §4 stk. 2). Her hevði verið betur at sett **skal** ella bara: landsstýrisfólkið **ger** nærri reglur.

Vinarliga

Eyðun Gaard

Eydun@nam.fo